# Gávubúðin hjá Eilif Arge á tremur við gávuhugskotum

**Handilin er frá 1960, men nógv er broytt, og í dag er leisturin ein heilt annar. Hjá Eilif Arge fæst alt frá gulli, silvuri og gávulutum, til kaffi og kryddarí. Og rørslutarnað hava ikki framkomutrupulleikar, tá tey vitja hjá Eilif Arge**

Tað var í 1960, at Eilif Arge lat upp handil, og æt tað tá ur, brillur gull og silvur.

Eilif doyði í 1968, og konan førdi handilin víðari. Í dag rekur sonurin, Magnus Arge, ið er ursmiður, handilin.

Í 1983 flutti handilin Eilif Arge í egnan bygning.

### Broyttu leistin í 2006

Í 2006 varð avgjørt at broyta leistin. Nú er talan um gull og silvur og um gávubúð.

Handilin er limur í norskari ketu, og umboðar Black Design, men eisini eittnú Georg Jensen gávulutir og Pandora.

Men sum nakað forkunnugt, so er handilin bygdur upp eftir norskari fyrimynd, tí Magnus hevur eitt norskt syskinnabarn, ið er designari, og sum tískil kundi hjálpa við hesum.

Eilif Arge er í dag so nógv meira, enn gávubúð, og eittnú fáast serlig sløg av kaffi, og alt sum hartil hoyrur, og eisini ymisk kryddarí.

### Vinarligt hjá rørslutarnaðum

Men siðvenjan er ikki heilt slept, og eittnú er Eilif Arge av størstu veitarum av steypum og líknandi, og at fáa gravering í er ongin trupulleiki.

Hjá rørslutarnaðum er ikki trupult at vitja hjá Eilif Arge, tí hesum hava tey tikið hædd fyri, tá bygt varð.

Ongar trappur eru og hurðin er sjálvvirkandi. Partar av innbúgvinum eru eisini á hjólum, so teir kunnu flytast, og yvirhøvur er plássið gott í handlinum.

### Á tremur

Og nú jólini nærkast, so er handilin hjá Eilif Arge sjálvandi á tremur, so kundarnir lættliga finna røttu jólagávurnar hjá Eilif Arge.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*




*Eilif Arge er í dag so nógv meira, enn gávubúð, og eittnú fáast serlig sløg av kaffi, og alt sum hartil hoyrur, og eisini ymisk kryddarí*
*Mynd: Jóannes N. Poulsen*










